# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Franska flogfarið er farið á flog og er á veg til Bulgaria við teimum seks umborð*

*(franska forsetaskrivstovan í morgun)*

# Latin leys aftur fyri hjálp

**Tey seks, sum vóru dømd til deyða í Libya fyri at hava smittað fleiri hundrað børn við HIV, komu heim til Bulgaria í morgun. Afturfyri fáa tey smittaðu børnini og foreldur teirra hjálp**



*Átta ár sótu tey í libyskum fongsli, og fyri stuttum fingu tey deyðadóm staðfestan. Í morgun sluppu tey úr fongslinum*

Tað vóru seks ovurfegin fólk, sum komu út úr flogfarinum í altjóða flog-havnini í Sofija í morgun, og tað vóru nøkur ovurfegin avvarðandi, sum tóku ímóti teimum.

- Orð eru óneyðug. Eg gleði meg bara til at taka um hana, segði Ivaylu Nikolchovskij, sum var komin út á flogvøllin at taka ímóti mammu síni, sjúkrasystrini Snezlanu Dimitrova.

Saman við fýra starvs-feløgum og einum lækna hevur hon sitið í fongsli í Libya síðani 1999, tá tey vórðu dømd fyri at hava givið meiri enn 420 libyskum børnum HIV-smittað blóð. 56 av børnu-num eru síðani deyð av sjúkuni.

Í rættinum í Tripoli vórðu tey seks dømd til deyða, men í síðstu viku gjørdi ein hægri dómstólur av at broyta dómin til lívlangt fongsul. Tað gjørdi, at tey seks kundu sendast til Bulgaria, tí sambært einum sáttmála frá 1981 kunndu tey bæði londini senda hvør øðrum ríkisborgarar, sum hava fingið fongsulsrevsing.

Tá tey seks komu til Bulgaria í morgun, komu tey við flogfarinum hjá franska forsetanum. Tað komst av, at franska forseta-frúan, Cecilia Sarkozy, hevði verið í Libya saman við uttanríkiskommiseri-num hjá ES, Benitu Ferrero-Waldner, har tær høvdu tingast við libysku myndug-leikarnar um at senda tey dømdu til Bulgaria.

Sambært avtaluni, sum Libya og Bulgaria hava gjørt um tey seks, binda Bulgaria og ES seg til at bøta um korini hjá teimum HIV-smittaðu børnunum. Millum annað skal libyska sjúkrahúsverkið fáa betri útgerð til at viðgera HIV-sjúklingar, og ein grunnur skal rinda avvarðandi hjá teimum smittaðu børnunum endurgjald.

# Mugu standa saman ímóti Iran

**Ísraelski forsetin, Shimon Peres, sigur, at allur heimurin eigur at standa saman og at noyða Iran at sleppa sínum kjarnorkuætlanum**

- Iran ger sær dælt av, at heimurin stendur spjaddur, sigur Shimon Peres við franska blaðið Le Figaro.

Hann vísir á, at Vestur-heimurin hevur leingi roynt at fáa altjóða samfelagið til at taka lógvatak fyri at steðga iransku kjarnorku-ætlanunum, men uttan úrslit, tí summi lond eru ímóti.

- So leingi vit eru ósamd, er Iran sterkt, sigur ísraelski forsetin og minnir á, at altjóða trýst kann bera frukt. Lond sum Ukraina, Libya, Suðurafrika og Norðurkorea hava slept sín-um kjarnorkuætlanum eftir altjóða trýsti, sigur hann.

Hildið verður fyri vist, at Ísrael hevur kjarnorkuvápn, hóast landið ongantíð hevur viðgingið, at tað er so. Serfrøðingar halda kortini, at Ísrael hevur umleið 200 kjarnorkuløðingar.



*- Heimurin má standa saman ímóti Iran, sigur Shimon Peres*

## STUTT SAGT

### Somalar flýggja

Ta seinastu vikuna eru umleið 10.000 fólk flýdd úr somaliska høvuðsstaðnum Mogadishu, sigur flóttafólkadeildin hjá ST, sum leggur afturat, at millum tey flýggjandi eru mong, sum fyri stuttum komu aftur til býin . Men tað er so ótrygt at vera í býnum, at tey hava valt at fara avstaðaftur. ST heldur, at umleið 400.000 fólk eru flýdd undan bardøgum og ófriði í Mogadishu. Í vár komu fleiri túsund heimaftur, tí tað var vorðið eitt sindur friðarligari, men nú gong-ur tað aftur tann skeiva vegin, sigur ST.

### Ikki til Bretlands

Russisku myndugleikarnir hava nú endaliga havnað bretska kravinum um at fáa fyrrverandi KGB-mannin Andrej Lugovoj útflýggjaðan til Bretlands. Bretska ákæruvaldið vil vera við, at tað var Lugovoj, sum gav fyrr-verandi agentinum Alex-ander Litvinenko eitur, tá nteir báðir hittust í London í november í fjør. Russisku myndugleikarnir siga, at bretsku prógvini eru ikki nóg góð, og tí verður Lugovoj ikki latin bretum. Eitt annað er, at russisk lóg forðar myndugleiku-num at útflýggja russiskar borgarar til rættarsókn í øðrum londum.

### AIDS vinnur

Sambært Anthoni Faci, sum er AIDS-ráðgevi hjá George W. Bush, er heim-urin í ferð við at tapa bar-dagan ímóti AIDS. Hann sigur við amerikanskar fjølmiðlar, at hvørja ferð ein AIDS-sjúklingur kem-ur í viðgerð, verða seks onnur smittað. Harafturat vísir tað seg, at bara ein fjórðingur av teimum smittaðu fáa viðgerð, sigur Anthoni Faci.